# Hálvársfrásøgn 2022

## Interim report H1 2022



TRYGD

TRYGD

# Innihaldsyvirlit / Contents

Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights ........ 2
Frágreiðing um fyrra hálvár 2022 ........ 3
Eginpeningur og solvensur hjá felagnum ........ 4
Útlit fyri seinna hálvár 2022 ........ 5
Aðrar upplýsingar ........ 5
English Summary H1 2022 ........ 6
Rakstrarroknskapur / Income statement ........ 7
Fíggjarstøða / Balance sheet ........ 8
Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity ........ 10
Notur / Notes ........ 11
Nota 1: Nýttur roknskaparháttur ........ 11
Grannskoðan og gjøgnumgongd ........ 11
Note 1: Basis of preparation of the H1 financial statements ........ 11
Audit and review ........ 11
Leiðsluátekning ........ 12
Statement by the management ........ 12

TRYGD

## Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

| DKK 1.000 | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 | 30.06.2018 | 31.12.2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur/Income Statement** | | | | | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross premiums earned | 75.616 | 69.063 | 65.242 | 60.741 | 56.351 | 140.671 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -48.032 | -47.784 | -50.642 | -36.743 | -37.859 | -105.823 |
| Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi / Total insurance operating expenses | -12.945 | -12.701 | -12.753 | -13.043 | -12.515 | -26.027 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | -6.096 | -4.241 | -1.170 | -3.348 | -4.074 | -10.021 |
| Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance | 156 | -56 | -40 | -97 | -56 | -82 |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **8.699** | **4.282** | **636** | **7.510** | **1.848** | **-1.282** |
| Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu / Investment yield after tech. interest rate income | -4.317 | -747 | -483 | -205 | -298 | -770 |
| **Úrslit / Net profit** | **3.607** | **2.890** | **147** | **5.990** | **1.271** | **-1.692** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Run-off result from net claims provisions | -2.065 | -1.804 | -2.120 | 1.784 | 1.215 | -1.692 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | | | | | | |
| Avsetingar til tryggingaravtalur í alt/ Total technical provisions | 132.756 | 114.682 | 112.668 | 103.379 | 97.360 | 112.353 |
| Tryggingaráogn tilsamans / Total Technical assets | 3.326 | 4.681 | 5.065 | 3.455 | 3.888 | 4.646 |
| Eginogn tilsamans / Total Equity | 59.410 | 60.385 | 91.406 | 82.019 | 74.748 | 55.803 |
| Áogn tilsamans / Total Assets | 199.920 | 185.177 | 213.442 | 194.502 | 181.079 | 178.608 |
| **Lyklatøl / Ratios** | | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 63,5 | 69,2 | 77,6 | 60,5 | 67,2 | 75,2 |
| Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio | 17,1 | 18,4 | 19,5 | 21,5 | 22,2 | 18,5 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 8,1 | 6,1 | 1,8 | 5,5 | 7,2 | 7,1 |
| Combined Ratio / Combined Ratio | 88,7 | 93,7 | 99,0 | 87,5 | 96,6 | 100,8 |
| Operating Ratio / Operating Ratio | 88,3 | 93,9 | 99,1 | 87,8 | 96,8 | 100,9 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum/ Relative Run-off gains/losses | -4,6 | -4,2 | -4,4 | 4,1 | 2,8 | -21,3 |
| Eginognsavkast í prosentum / Return on Equity | 6,0 | 3,6 | 0,2 | 7,7 | 1,6 | -2,2 |

Yvirlit yvir gongdina seinastu fimm árini er gjørt sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Við virknaði frá 1. januar 2019 er nýggja kunngerðin sett í gildi. Samanberingartølini fyri 2018 eru tillagað til nýggju kunngerðina.

The Five Year Summary is rendered in accordance with Executive order No. 4 from 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies. The new Executive order came into effect on 1 January 2019. Comparative figures for 2018 are adjusted in accordance with changes in the new Executive order.

TRYGD

## Frágreiðing um fyrra hálvár 2022

Fyrra hálvár í 2022 hevur yvirskipað gingið væl. Tryggingarinntøkurnar hava verið lutfalsliga høgar, vit hava sæð ein vøkstur í inntøkunum, og skaðarnir hava verið á einum vanligum støði. Hinvegin hevur árið higartil verið nógv merkt av órógvi á fíggjarmarknaðinum, og hóast ein varligan íløgupolitikk, hevur Trygd í fyrru helvt av 2022 havt lutfalsliga stór tap á serliga lánsbrøvum.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 4,4 mió. kr., sum er lægri enn væntað, men tó hægri enn sama tíðarskeið í fjør. Til samanberingar var úrslitið 3,6 mió. kr. áðrenn skatt fyrra hálvár í 2021.

Tryggingartekniska úrslitið gjørdist 8,7 mió. kr. samanborið við 4,3 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Bruttotryggingargjøldini hjá Trygd hava verið støðugt vaksandi seinastu árini. Samanborið við sama tíðarskeið í fjør eru tey hækkaði við 8,6 mió. kr., og tey eru nú 95,1 mió. kr. samanborið við 86,5 mió. kr. fyrra hálvár í 2021.

### Útreiðslurnar hjá felagnum

Útreiðslurnar í sambandi við skaðar vóru hægri fyrra hálvár í ár enn fyrra hálvár í 2021. Tó samsvarar samlaði vøksturin áleið við vøksturin í inntøkunum. Skaðaendurgjøld hjá Trygd vóru 47,3 mió. kr. samanborið við 45,0 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Harafturat er vert at nevna, at eins og alt annað, ið er dýrkað nógv seinastu tíðina, er tað vorðið dýrari at gera skaðar aftur, og hetta hevur sjálvsagt ávirkað hækkandi skaðaendurgjøldini.

Hyggja vit eftir bruttoendurgjaldsprosentinum fyri fyrra hálvár, er tað eitt sindur lægri enn sama tíðarskeið í fjør. Fyrra hálvár var tað 63,5%, meðan tað sama tíðarskeið í fjør var 69,2%.

Síðani 2020 hevur Covid-19 havt sera stóra ávirkan ferðavinnuna og sostatt eisini á vinnuliga virksemið hjá Trygd. Vit hava sæð eina afturgongd hjá ferðavinnuni orsakað av Covid-19, men nú byrjar at koma ferð aftur á ferðavinnuna. Føroyingar ferðast meira uttanlands, og alsamt fleiri ferðafólk koma hendavegin, og henda positiva gongdin hevur sjálvsagt ávirkað virksemið hjá Trygd fyrra hálvár í ár samanborið við 2020 og 2021.

### Hall á íløguvirkseminum

Íløguvirksemið fyrra hálvár í ár hevur givið eitt hall á 4,3 mió. kr. samanborið við 0,7 mió. kr. í halli sama tíðarskeið í fjør. Orsøkin til hallið er lága rentustøði og varna íløgutilgongdin hjá Trygd. Meginparturin av íløgufænum er sett í lánsbrøv við sera góðari flokking, men júst hesi vanliga so tryggu lánsbrøv hava havt stór hall í fyrru helvt av 2022, og hetta er sostatt orsøkin til vánaliga avkastið.

TRYGD

**Sum heild nøktandi úrslit**

Rakstrarkostnaðurin í fyrra hálvári samsvaraði við væntanirnar og er á nøkulunda sama støði sum sama tíðarskeið í fjør, ið verður mett at vera nøktandi. Tá ið havt verður í huga, at virksemið hjá Trygd er vaksandi, er hetta eitt tekin um, at fyritøkan áhaldandi gerst meira effektiv.

Endurtryggingarskipanin, sum Trygd hevur lagt seg eftir, lagar seg støðugt eftir tilgongdini av kundum og hækkandi virðum umframt at minka um ógvusligu árinini av fleiri stórum skaðahendingum. Vavið av stormskaðum søguliga sæð hevur við sær støðugt hægri kostnaðir til hendan partin av virkseminum.

Til samans hevur Trygd rentað eginpeningin við 6,0% fyrra hálvár í 2022.

Leiðslan metir úrslitið vera nøktandi, tá ið hædd verður tikin fyri, at tryggu lánsbrøvini hava givið stór hall í hesum ótryggu tíðum. Leiðslan fegnast um, at Trygd, síðani tað var stovnað í 1998, áhaldandi tryggjar kapping á føroyska tryggingarmarknaðinum, og samstundis at felagið áhaldandi er ein virkin leikari í menningini av nýggjum tilboðum til føroyskar kundar og er bæði sterkt og ført fyri at hjálpa kundunum, tá ið tørvur er á tí.

## Eginpeningur og solvensur hjá felagnum

Tann 30. juni 2022 var eginognin hjá felagnum 59,4 mió. kr. P/F BankNordik eigur partapeningin, ið er 40,0 mió. kr.

Trygd hevur gjøgnum fyrra hálvár 2022 latið inn uppgerðir um individuellan solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um individuellan solvens, ið er neyðugur í sambandi við virksemið hjá felagnum, er nakað lægri enn bókaða eginognin.

Individuella solvenskravið tann 30.06.2022 var 42,6 mió. kr., meðan kapitalgrundarlagið til at lúka solvenskrøvini var 58,5 mió. kr. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður og á einum støði, ið leiðslan er nøgd við.

Solvensdekningurin tann 30.06.2022 var 1,37. Niðanfyri sæst solvensdekningurin árini 2018-2022.

| | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 | 30.06.2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvensdekningur** | 1,37 | 1,60 | 2,11 | 1,54 | 1,59 |

Solvensurin er gjørdur upp eftir sonevndu “Solvens II”-reglunum frá 2018.

TRYGD

## Útlit fyri seinna hálvár 2022

Leiðslan væntar, at í komandi hálvári fara vit at síggja hækkandi inntøkur, men samstundis eisini fleiri skaðar. Vandin fyri stormum er altíð størri um veturin, og hetta kann sostatt ávirka virksemið hjá felagnum komandi tíðina. Harafturat kunnu arbeiðsskaðar taka drúgva tíð at viðgera, og tí kunnu slíkir gamlir skaðar eisini hava ávirkan á úrslitið hjá felagnum.

Úrslitið fyri restina av árinum verður í stóran mun ávirkað av gongdini á tryggingarmarknaðinum, har kappingin um kundarnar framhaldandi er hørð. Harumframt kunnu einstakir stórir skaðar henda – serliga arbeiðsskaðar og stormskaðar – ið sjálvsagt ávirka úrslitið hjá felagnum. Eisini hava vit sæð, at fíggjarmarknaðurin er sera óstøðugur í løtuni, og tað fer helst eisini at seta sín dám á gongdina.

Leiðslan væntar, at árið endar við einum úrsliti millum 6 – 12 mió. kr. áðrenn skatt.

## Aðrar upplýsingar

Ein størri eldur í einum virkisbygningi var í augustmánaði, sum fer at hava negativa ávirkan á fíggjarliga úrslitið hjá Trygd. Annars eru ongar aðrar nevningarverdar hendingar farnar fram síðan 30. juni 2022, sum hava avgerandi ávirkan á raksturin og fíggjarligu støðuna hjá felagnum.

TRYGD

## English Summary H1 2022

Premium growth continued its positive development in the first half of 2022. However, claims were under pressure from rising inflation, and financial market turmoil caused significant losses on investments.

Trygd reported a pre-tax profit of DKK 4.4m, which is higher than in the same period last year, but lower than expected. For comparison, the H1 2021 pre-tax result was DKK 3.5m.

Trygd is an important part of the insurance landscape for Faroese households and companies alike ever since bringing competition to the Faroese insurance market in 1998.

After the COVID-19 pandemic lost its grip on the world, tourism has picked up pace. This has affected Trygd with more Faroese people travelling abroad and as well as foreign tourists coming to the Faroe Islands, e.g. increasing car rentals.

Management is satisfied with the result considering the unexpected loss on the company's bonds holdings during the period.

The individual solvency requirement was DKK 42.6m on 30 June 2022 while the company's eligible Base Capital was DKK 58.5m. This results in the company's relatively strong solvency ratio with which the management is satisfied.

| | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 | 30.06.2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvency Ratio** | 1,37 | 1,60 | 2,11 | 1,54 | 1,59 |

Solvency is calculated according to the new Solvency II regulations in 2018-2022.

Trygd expects the year to end with a profit before tax between DKK 6 – 12. Uncertainty is mainly related to the effect of volatility in the financial markets and the possibility of storms.

During August, there was a fire in a medium-large industrial building insured with Trygd, which will have a negative effect on the company's financial results for the year. No other events have occurred since 30 June 2022, which are of material significance to the company's financial or operating position.

TRYGD

## Rakstrarroknskapur / Income statement

| DKK 1.000 | 30.06.2022 | 30.06.2021 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld brutto / Gross premiums written | 95.085 | 86.464 |
| Endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums | -6.565 | -8.167 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in gross provisions for unearned premiums | -19.469 | -17.401 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum tryggingargjøldum / Change in reinsurers' share of provisions for unearned premiums | -431 | 545 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Earned premiums, net of reinsurance** | **68.620** | **61.442** |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Technical interest, net of reinsurance** | **156** | **-56** |
| Útgoldnar veitingar/ Claims paid | -47.127 | -45.199 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries | 1.626 | 1.780 |
| Broyting í avsetingum til endurgjøld / Change in gross provisions for claims | -964 | -2.573 |
| Broyting í váðaíkasti / Change in Risk margin | 58 | -13 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til endurgjøld / Change in reinsurers' share of gross provisions for claims | -888 | 995 |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt / Claims incurred, net of reinsurance** | **-47.295** | **-45.008** |
| Útveganarkostnaðir/ Acquisition costs | -10.182 | -9.912 |
| Fyrisitingarkostnaðir / Administrative expenses | -2.763 | -2.789 |
| Provisiónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum / Commission from reinsurers | 164 | 605 |
| **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt / Total insurance operating expenses, net of reinsurance** | **-12.782** | **-12.096** |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **8.699** | **4.282** |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. / Interest income and dividends, etc. | 669 | 705 |
| Virðisjavningar / Value adjustments of investment assets | -4.684 | -1.326 |
| Rentuútreiðslur / Interest expenses | -67 | -92 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi / Administration cost related to investment activity | -80 | -90 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments** | **-4.161** | **-803** |
| Renta og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Interest and value adjustments of provisions | -156 | 56 |
| **Úrslit av íløguvirksemi aftan á rentu og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum/ Return on investment activities** | **-4.317** | **-747** |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **4.382** | **3.535** |
| Skattur / Tax | -774 | -645 |
| **Hálvársúrslit / Profit for the period** | **3.607** | **2.890** |

TRYGD

## Fíggjarstøða / Balance sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2022 | 30.06.2021 |
|---|---|---|
| **Ogn / Assets** | | |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 628 | 842 |
| Bygningar til egna nýtslu/ Real property | 2.603 | 2.631 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **3.231** | **3.473** |
| | | |
| Lánsbrøv / Bonds | 160.873 | 160.189 |
| Íløguprógv / Investment funds | 18.841 | |
| **Íløguogn í alt/ Investment assets** | **179.715** | **160.189** |
| | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum/ Reinsurers' share of provisions for unearned premiums. | 217 | 1.132 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / Reinsurers' share of provisions for unpaid claims. | 3.109 | 3.549 |
| **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt / Total reinsurer's share of provisions for insurance contracts** | **3.326** | **4.681** |
| | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 4.656 | 5.551 |
| **Áogn í samband við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables in connection with direct insurance contracts** | **4.656** | **5.551** |
| | | |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 1.365 | 305 |
| Áogn hjá atknýttum virkjum / Receivables from affiliated companies | 0 | 0 |
| Onnur áogn / Other receivables | 0 | 0 |
| **Áogn í alt / Total receivables** | **9.347** | **10.537** |
| | | |
| Útsett skattaogn / Deffered tax surplus | 153 | 98 |
| Tøkur peningur / Cash and cash equivalents | 5.494 | 9.211 |
| **Onnur ogn í alt/ Other assets** | **5.647** | **9.309** |
| | | |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 761 | 664 |
| Aðrar tíðarmarkinger / Other prepayments and accrued income | 1.220 | 1.006 |
| **Tíðaravmarkingar í alt/ Total accrued income** | **1.981** | **1.670** |
| | | |
| **Ogn í alt / Total assets** | **199.920** | **185.177** |

TRYGD

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2021 | 30.06.2021 |
|---|---|---|---|
| | **Skyldur / Equity and liabilities** | | |
| | | | |
| | Partapeningur ella ábyrgdarpeningur / Share capital | 40.000 | 40.000 |
| | Aðrar burturleggingar / Reserve Equity fund | 615 | 615 |
| | Framflutt úrslit / Retained earnings | 18.795 | 19.770 |
| | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends | 0 | 0 |
| | **Eginogn í alt / Equity** | **59.410** | **60.385** |
| | | | |
| | Avsett til tryggingargjøld / Gross provisions for unearned premiums | 67.879 | 61.770 |
| | Avsett til endurgjøld / Gross provisions for claims | 60.268 | 48.473 |
| | Váðaískoyti á skaðatryggingaravtalum / Risk margin | 4.610 | 4.440 |
| | **Avsetingar til tryggingaravtalur í alt / Total technical provisions** | **132.756** | **114.682** |
| | Útsettur skattur / Deferred tax receivables | | |
| | **Avsetingar í alt / Total provisions** | **132.756** | **114.682** |
| | | | |
| | **Skuld / Debt** | | |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging / Debt related to reinsurance | 1.289 | 1.029 |
| | Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | | 876 |
| | Skuld til atknýtt virkir / Commitments to related parties | 2.138 | 1.560 |
| | Beinleiðis skattur / Tax | 454 | 2.966 |
| | Onnur skuld / Other payables | 3.649 | 3.276 |
| | **Skuld í alt/ Total debt** | **7.529** | **9.707** |
| | | | |
| | **Tíðaravmarkingar / Accruals and deferred income** | **225** | **403** |
| | | | |
| | **Skyldur í alt / Total equity and liabilities** | **199.920** | **185.177** |

1 Nýttur roknskaparháttur / Accounting Policies

TRYGD

# Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity

| Uppgerð av eginogn / Statement of changes in equity | Partapeningur / Share capital | Uppskrivingargrunnur / Revaluation | Flutt úrslit / Retained earnings | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends | Eginogn / Equity |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2021 /** Shareholders'equity at January 1, 2021 | 40.000 | 615 | 16.880 | 0 | 57.495 |
| **Ársúrslit /** Net profit | 0 | 0 | -1.692 | | -1.692 |
| **Eginogn 31. desember 2021 / Shareholders'equity at December 31. 2021** | **40.000** | **615** | **15.188** | | **55.803** |
| **Eginogn 1. januar 2022 /** Shareholders'equity at January 1, 2022 | 40.000 | 615 | 15.188 | | 55.803 |
| **Útgoldið vinningsbýtið /** Payed dividend | 0 | 0 | 0 | | |
| **Hálvársúrslit /** Net profit for the period | 0 | 0 | 3.607 | 0 | 3.607 |
| **Eginogn 31. juni 2022 / Shareholders'equity at juni 31. 2022** | **40.000** | **615** | **18.795** | **0** | **59.410** |

TRYGD

# Notur / Notes

## Nota 1: Nýttur roknskaparháttur

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til ársroknskapin fyri 2021. Víst verður tí eisini til brotið um nýttan roknskaparhátt í ársroknskapi felagsins fyri 2021.

## Grannskoðan og gjøgnumgongd

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

## Note 1: Basis of preparation of the H1 financial statements

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 4 from 27th of June 2018 on financial reports presented by insurance companies and holding companies. The accounting policies are unchanged with respect to the Annual Report for 2021. For reference see also the section with Accounting Policies in the 2021 Annual Report.

## Audit and review

No audit or review has been done to this interim report by internal or external auditors.

TRYGD

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri fyrra hálvár 2022 hjá Trygd P/F.

Hálvársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at hálvársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarstøðuni tann 30. juni 2022 og úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri tíðarskeiðið 1. januar 2022 til 30. juni 2022.

Okkara fatan er, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í P/F Trygd, fíggjarligu støðuna umframt eina lýsing av týdningarmestu óvissunum, sum kunnu fara at ávirka felagið.

Tórshavn, 15. september 2022

## Statement by the management

The Board of Directors and the Management Board have today reviewed and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2022.

The interim financial statements have been prepared in accordance the regulatory requirements and possible requirements from Trygd's Articles of Association or contracts.

In our opinion, the management's report includes a true and fair view of the company's assets and liabilities, and the balance sheet at 30 June 2022 and of the result of the company's operations for the period 01 January 2022 to 30 June 2022.

We consider the management's report to give a fair representation of the development of Trygd P/F and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

Tórshavn, 15 September 2022

**Stjórn / Executive Board**

Brian Smedemark

**Nevnd / Board of Directors**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Árni Ellefsen<br>*Formaður / Chairman* | Turið F. Arge | Heini Thomsen | Christian Clemmensen |